# Kristel við nýggjum sangi

**SANGUR Eftir stuttan steðg frá føroyska tónleikapallinum er songkvinnan Kristel Lisberg klár við nýggjum sangi**

Tíðindaskriv

Kristel hevur mangan verið mett at vera ein av okkara bestu songkvinnum, og nú verður hon at hoyra við nýggja lagnum »In the Lights«. Kristel hevur verið mest kend fyri at syngja country, men á nýggja lagnum, er stílurin heilt øðvísi frá tí, vit annars kenna hana fyri. Yvir eitt longri tíðarskeið hevur Kristel arbeitt við at gera nýggjan tónleik, ætlanin er at hetta skal vera fyrsta lagið av fleiri, sum fara at koma út.

Nýggja lagið »In the Lights« sigst at vera ein blanding av pop og electro. Kristel hevur sjálv skriva orðini, meðan Torbjørn A. Lisberg hevur gjørt lagið. Kristoffer Mørkøre hevur staðið fyri framleiðslu.

Lagið verður at hoyra í næstum í Kringvarpinum og Rás2. Somuleiðis ber til at hoyra lagið á myspace.com/kristellisberg.



*Kristel Lisberg*

# Íslendingar ovfarnir ov nólsoyingum




*Tað tekur nógvar tímar at seta pallin upp og enn fleiri tímar at rigga øll ljósini til – tey spæla ein týðandi lut í leikinum*

**SJÓNLEIKUR Fullsett hús og eykasýning mátti til, tá leikhópurin hjá Royndini í Nólsoy vitjaði á Hafnarfirði um vikuskifti. Serliga tey professionellu lótu sera væl at leikinum, Havgird**

Vilmund Jacobsen

Longu á NEATA-festivalinum, sum í fjør var á Akureyri á Norðurlandinum í Íslandi, gjørdust íelsndingar bergtiknir av føroyska íkastinum.

Havgird er ein samanrenning av føroyskum og íslendskum hugflogi, sum íbirtist eina náttina á sumri 2008.

Águsta Skúladóttur var í Føroyum í sambandi við skeiðsdagar hjá MáF, eitt árligt skeið, sum í 2008 varð hildið í Klaksvík.

Hilmar Joensen var og er framvegis formaur í MáF, og tá einir tveir dagarvóru eftir at skeiðið varð liðugt, til Águsta slapp aftur til Íslands, endaði hon í Nólsoy hjá Gunnvør og Hilmari.

Og tað var í hesum døgum, at talan fall á sjógvin og hvussu nær bæði føroyingar og íslendingar eru sjónum. Upprunaloiga var ætlanin at taka tríggjar ymiskar søgnir, eina grønlendska, eina íslendska og eina føroyska, og byggja leikin á tað, men tá av tornaði var bert Inuitsøgnin um beinagrindakonuna eftir, meðan restin av leikinum gjørdist nakað heilt annað.

Hetta, at byggja ein leik upp frá botni og so at siga ongantíð hava nakað fast leikrit, nevnist deviced theatre, og har eru tað leikstjóri, leikarar og í hesum førinum eisini leiktjøldog búnasniðgevin, Katrín Thorvaldsdóttur, sum øll hava givið leikinum sítt íkast.

## Týdningarmiklir áskoðarar

Til fyrstu sýningina leygarkvøldið var væl meiri av fólki tikið inn, enn tey eitthundrað, sum upprunaliga var pláss til. Eini 130 atgongumerki vóru seld, og tí mátti fyrireikararnir vera kreativir við plássinum.

Eisini sunnukvøldið var útselt, so ein eyka sýning mátti til mánakvøldið, fyri at øll áhugað kundu fáa høvið at síggja vitjandi nólsoyingarnar.

Og tað vóru ikki bara sjónleikaáhugaði meðal íslendingurin, sum var og hugdi eftir Havgird. Ikki færri enn tríggir verandi og fyrrverandi stjórar á Tjóðpalli Íslands hava sæð leikin um vikuskiftið. Og allir tríggir vóru ovfarnir av leikinum, sum í stóran mun byggir á ljóð- og ljóseffektir umframt vanligu leiklistina.

Sveinn Einarsson, ið var stjóri á Tjóðpallinum frá 1972 til 1983, var ein av teimum trimum, Stefán Baldursson ein annar. Hann var stjóri á Tjóðpallinum frá 1991 til 2005, og er nú stjóri á nýggja snotiliga operahúsinum, Harpan.

Eisini verandi Tjóðpallastjóri, Tinna Gunlaugsdóttir, hevur sæð Havgird um vikuskiftið, og eins fyri øll trý er, at tey vóru stórliga bergtikin av nólsoyingunum.

Leygardvøldið var eisini Jóhannes Haukur Jóhannesarson og hugdi. Jóhannes er ein av allar best umtóktu sjónleikarunum í Íslandi, og skal eitt nú verða við í fyrstu operuni, sum verður framførd í nýggja operahúsinum, Harpan. Talan er um kendu operuna Gandafloytan við tónleiki eftir Mozart.

Jóhannes Hauku Jóhanesarson, ið er hálvur føroyingur, rósti leikinum upp um skýggja á facebookprofili sínum og mælti øllum til at síggja henda merkisverda leik.

## Positivt

Í heila tikið hevur leikurin bert fingið positivan kritikk frá leikum sum lærdum. Ein heimskendur dukkuførari, sum býr í Íslandi, hevði koyrt í tveir tímar fyri at síggja leikin, og fór avgjørt ikki vónbrotin avstað aftur.

Serliga millum professionell hevur leikurin fingið góða móttøku, og tí undraði tað í veruleikanum ikki, tá Havgird varð vald út at umboða Føroyar til NEATA-festivalin í Íslandi, sum var á Akureyri í fjør. Eisini har fekk leikurin sera góða móttøku, og tí gjørdist eingin bilsin, tá Havgird varð boðin við til IATA-festivalin, sum verður í Tromsø í døgunum 14. til 24. juli í ár.

Ferðalagið verður eitt sindur víðkað til Tromsø. Leikararnir í Havgird eru fimm í tali, umframt ljóð-og ljósmenninar, Petur Hans Poulsen og Súna Joensen, sum eisini – rættiliga óvanligt – hava sínar leiklutir í leikinum.

Hinir leikararnir eru Hilmar Joensen, Nicolaj Falck, Leo Poulsen, Barbara Andreasen og einasti ikkinólsoyingurin, Mariann Hansen av Norðskála. Framleiðslustjóri er Gunnvør Joensen.

Við í ferðalagnum til Tromsø verða – umframt leikstjórin og pall- og búnasniðgevin, Ágústa Skúladóttir og Katrín Torgeirsdóttir – eisini íslendingarnir Erna Bjørg Halltóra Einarsdóttir og Guðmundur Erlingsson, sum hevur verið høvuðsmaðurin at fáa leikin aftur til Íslands.

vilmund@sosialurin.fo